LM-087/2020

UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Dagf.: 26. januar 2021
Málsnr.:20/02441
Viðgj.: SPS

Hoyringarnotat

Uppskot til løgtingslóg um elelektriskan útbúnað elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin)

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá:
SEV, Føroya Handverksmeistarafelag, Fíggjarmálaráðnum, Fiskimálaráðnum, Føroya Landfúta, Sjóvinnustýrinum, Búnaðarstovuni, Umhvørvisstovuni, Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, Landsverk, Vinnuhúsinum, Áhugafelagnum hjá elinnleggjarum, stílað: Vinnuhúsinum, Sorinskrivaranum.

Inn komu hoyringarsvar frá:
SEV, Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Landfúta, Arbeiðs- og brunaeftirlitinum og Umhvørvisstovuni.

Føroya Landfúti og Fiskimálaráðið høvdu ongar viðmerkingar til uppskotið.

SEV

SEV hevur hesar generellu viðmerkingar til uppskotið:
"Talan er um eina rammulóg. Harvið er vavið á hesum virkisøkinum ikki neyvt ásett, tá ið tilhoyrandi kunngerðirnar og skiftisreglurnar ikki eru orðaðar í skrivandi løtu. Tað ber tí illa til at gera viðmerkingar til virksemi, sum hendan lógin førir við sær og enn minni hvat tann avleiddi búskapurin (kostnaðurin) er av virkisøkinum. Sum skilt á lógaruppskotinum, skal allur kostnaður av hesum virkisøkinum gjaldast av SEV. Tað er eitt ósunt princip at summi valda, meðan onnur gjalda. SEV dámar ikki eina skipanina, har man ikki hevur ávirkan á tær veitingar, sum man skal gjalda fyri. Mælt verður til at kunngerðirnar og skiftisreglurnar verða gjørdar og fyriliggja áðrenn lógaruppskotið verður viðgjørt, soleiðis at málið kann verða viðgjørt á einum upplýstum og forsvarligum grundarlagi. Hetta var eisini gjørt tá sterkstreymlóggávan var dagførd í 1993 og bæði uppskot til lógir og kunngerðir fyrilógu. Sambært lógaruppskotinum verður roknað við, at uppskot til kunngerðir kunnu verða sendar til ummælis seinni í hesum árinum. Undir øllum umstøðum eigur tað at vera soleiðis, at SEV verður við í arbeiðnum at orða kunngerðirnar og skiftisreglurnar. SEV bjóðar seg fram til at luttaka í hesum arbeiði á ein konstruktivan og skjótan hátt."

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins:
Sum SEV vísir á í ummælinum, so er talan um eina rammulóg. Av lógaruppskotinum sæst, hvussu yvirskipaðu karmarnir fyri eltrygdarøkið skulu vera, og hvat skal fara fram á økinum.

Hvussu umsitingin av lógini í praksis nærri skal verða skipað, undir hesum m.a. hvørjar uppgávur skulu leggjast til annan myndugleika, netfelagið ella privata fyritøku; hvussu uppgávurnar innanfyri ásettan fíggjarkarm skulu raðfestast, og á hvønn hátt tær skilabest verða framdar í verki, er ein fyrisitingarligur spurningur, sum landsstýrismaðurin og Elnevndin taka avgerð um og í samráð við SEV, um eftirlitssuppgávur verða lagdar til SEV. Fortreytin fyri støðutakan til hetta er, at tað er greitt, hvørjir karmarnir eru, sum skipanin skal halda seg innanfyri. Við lógaruppskotinum verða skaptir slíkir greiðir lógarkarmar.

Nýggja eltrygdarlógin skal koma í gildi 1. januar 2021, og galdandi kunngerðir halda fram til nýggjar verða settar í gildi, ætlandi síðst í komandi ári. Tað verða tí stundir at viðgera allar spurningar soleiðis, at kunngerðirnar og skiftisreglurnar verða viðgjørdar á einum upplýstum og forsvarligum grundarlagi, og SEV verður inndrigið í hetta arbeiðið.

SEV hevði aðrar meira tekniskar viðmerkingar, sum tað í flestu førum er tikið undir við í hesum viðmerkingunum, og er uppskotið rættað samsvarandi.

Føroya Handverksmeistarafelag
"Svar til uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar
Føroya Handverksmeistarafelag hevur viðgjørt uppskotið til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar.

Felagið vil vísa á, at tað er alneyðugt, at ein føroyskt góðkendur el-innstallatørur góðkennir og hevur ábyrgdina av undanframleiddum el-installatiónum."

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins:
Undanframleiddar elektriskar innleggingar verða ikki viðgjørdar í uppskotinum til nýggja eltrygdarlóg, men í uppskotinum til nýggja løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarafyritøku, og kann verða viðgjørt í tí málinum.

Arbeiðseftirlitið
"Viðvíkjandi: Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, innleggingar og tilfar og uppskot til løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarafyritøkum.
Við hesum skal Arbeiðs- og brunaeftirlitið geva sítt hoyringarsvar til omanfyrinevndu uppskot. Yvirskipað metir Arbeiðs- og brunaeftirlitið, at talan er um eitt sera jaligt lóggávuátak, eftirsum tað hevur alstóran týdning, at tílík teknisk lóggáva, ið hevur við trygd at gera, áhaldandi verður dagførd, soleiðis at hon kann sammetast við tilsvarandi lóggávu í grannalondum okkara. Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal samstundis vísa á, at eltrygdarlóggávan og lóggávan um maskintrygd, sum stovnurin umsitur, liggja tætt upp í móti hvørjari aðrari. Lóggávan um maskintrygd verður ætlandi dagførd í nærmastu framtíð. Ætlaða dagføringin av eltrygdarlóggávuni tryggjar, at tekniskur samanhangur framhaldandi verður millum krøvini til maskintrygd og krøvini til eltrygd. Við báðum uppskotum verður skotið verður upp, at Elnevdin við góðkenning frá landsstýrismanninum, í størri ella minni mun, kann leggja virksemi, heimildir og praktiskar uppgávur til ein av verandi stovnum hjá landinum, t.d. Arbeiðs- og brunaeftirlitið. Sum útgangsstøði er Arbeiðs- og brunaeftirlitið

jaligt sinnað hesum viðvíkjandi, og metir at sera góðir møguleikar eru fyri samvirkandi fyrimunum við aðrar partar av virkseminum hjá stovninum. Neyðugt er tó, at ein greiður fíggingarleistur er fyri økta virksemið. Arbeiðs- og brunaeftirlitið skal mæla til, at tikið verður undir við lógaruppskotunum."

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins:
Skotið er upp, at Elnevndin kann skipa eina avgreiðsluskrivstovu við góðkenning landsstýrimansins. Tað er ikki tikin nærri støða til spurningin enn, men av viðmerkingunum til uppskotið gongur fram, at avgreiðsluskrivstovan kann verða løgd til ein stovn undir landsstýrismanninum ella til netfelagið.

Umhvørvsstovan

"Viðv. uppskoti til løgtingslóg um elektriskan útbúnað v.m.
Víst verður til uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, sí niðanfyri, sum varð sent Umhvørvisstovuni til hoyringar í telduposti 8. januar 2020.

Í kapittul 7 í lógaruppskotinum eru ásetingar um Ognartøku, og harundir eru í § 33 í lógaruppskotinum m.a. ásetingar um ognartøka viðvíkjandi fastogn til útbúnað til framleiðslu, flyting, býti og goymslu av elmegi.

Í elveitingarlógini (løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni) eru ásetingar m.a. um, at loyvi til elframleiðslu úr vindorku bert kann verða givið aftaná, at alment hevur verið lýst, at umsókn um loyvi er móttikin, og at onnur áhugað kunnu søkja um sama loyvi. Eisini eru ásetingar um, at landsstýrismaðurin, í sambandi við veitan av loyvi ella seinni, kann seta krav um, at loyvishavarar samstarva um útbúnað og savningarøki. Landsstýrismaðurin skal í viðgerðini av umsóknum um loyvi taka atlit til orkupolitikk og orkutørv landsins.

M.a. tann sannroynd, at tað kann gerast trupult at útvega hóskandi lendi til framtíðar orkuútbyggingar, talar fyri, at ein møgulig heimild at ognartaka privata og aðra ogn, eisini er viðkomandi at fáa inn í elveitingarlógina. Hetta sum eitt neyðugt amboð hjá landsstýrismanninum at kunna útfylla karmarnar í elveitingarlógini við eitt nú at kunna arbeiða fyri, at størst møguligur partur av elframleiðsluni við tíðini kann koma frá varandi orkukeldum.

Avmarkingar í at fáa atgongd til hóskandi lendi til orkuútbyggingar kunnu skjótt viðføra, at lógarásetta málið um skjótast gjørligt at grunda elframleiðsluna á varandi orkukeldur verður seinkað.

Samanumtikið verður sostatt mett, at ásetingarnar viðv. ognartøku í fyriliggjandi lógaruppskoti um elektriskan útbúnað v.m. eisini eru viðkomandi fyri elveitingarlógina. Hetta serliga við atliti til, at nakrar av høvuðsuppgávunum, sambært elveitingarlógini, eru at skapa hóskandi karmar fyri útbyggingar á elorkuøkinum, og eitt týðandi atlit í hesum samanhangi er júst atgondin til hóskandi lendi til orkuútbyggingar - serliga vindorkuútbyggingar."

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins:
Undir fyrireikingararbeiðinum av lógaruppskotinum er spurningurin um, hvørt ognartøkuheimildirnar eiga at standa í eltrygdarlógini ella elveingarlógini, ikki viðgjørdur, men hesin spurningurin kann møguliga takast upp í einum øðrum høpi.

Upplýsast kann tó, at danska eltrygdarlógin hevur ognartøkuheimildir til útbúnað til framleiðslu, flyting, býti og goymslu av elmegi, sum eru soljóðandi:

"Kapitel 6

Ekspropriation

§ 27. Når hensynet til almenvellet kræver det, kan Sikkerhedsstyrelsen tillade ekspropriation til elektriske anlæg for produktion, transmission, distribution og lagring af elektrisk energi. Reglerne i lov om fremgangsmåden ved ekspropriation vedrørende fast ejendom følges.

§ 28. Erhverver ejeren af et elektrisk anlæg til produktion, transmission, distribution og lagring af elektrisk energi, med henblik på etablering af et elektrisk anlæg hertil, rettighed over fast ejendom, afgøres spørgsmålet om erstatningens størrelse ved uenighed mellem rettighedshaveren og ejeren af det elektriske anlæg af en voldgiftsret, hvor hver af parterne vælger en voldgiftsmand. Kan der ikke opnås enighed mellem voldgiftsmændene, træffes afgørelsen ved kendelse afsagt af en opmand udpeget af præsidenten for vedkommende landsret.
Stk. 2. Opmandens kendelse om erstatning kan af hver af parterne ved begæring fremsat overfor opmanden inden 4 uger fra kendelsen indbringes for vedkommende taksationskommission efter reglerne i § 19 i lov om fremgangsmåden ved ekspropriation vedrørende fast ejendom. I øvrigt finder reglerne i § 26 i nævnte lov tilsvarende anvendelse."

Leinkja til viðmerkingar til uppskotið:

https://www.retsinformation.dk/Forms/R0710.aspx?id=167705#Kap6

Brot úr viðmerknginum til § 27 í donsku eltrygdarlógini:

"Til § 27

".....
Det foreslås, at forslagets § 27 udvides til også at omfatte ekspropriation til elektriske anlæg til lagring af elektrisk energi, idet anlæg til lagring af elektrisk energi vil kunne komme til at indgå i det samlede elforsyningssystem sammen med anlæg til produktion, transmission og distribution af elektricitet. Der henvises til bemærkningerne til lovforslagets § 2, stk. 1.

Efter forslagets § 27 skal Sikkerhedsstyrelsen ved behandlingen af ansøgninger om tilladelse til ekspropriation foretage både en vurdering af forholdet til almenvellet og anlæggets

sikkerhedstekniske forhold. Sikkerhedsstyrelsen skal i forbindelse med vurderingen af forholdet til almenvellet blandt andet vurdere, hvilke ejendomme respektive linjeføring og fremføringsmåde, der ud fra hensynet til almenvellet skal foretrækkes til placering af anlægget – inden for rammerne af den fysiske planlægning. I forhold til anlæggets sikkerhedstekniske forhold skal Sikkerhedsstyrelsen foretage en vurdering af, om anlægget er udformet i overensstemmelse med regler i forslaget til lov om sikkerhed ved elektriske anlæg, elektriske installationer og elektrisk materiel (elsikkerhedsloven) og de sikkerhedstekniske regler, der senere fastsættes i medfør heraf.

For så vidt angår produktionsanlæg over 25 MW og transmissionsanlæg over 100 kV, som er godkendt af Energistyrelsen efter lov om elforsyning, og transmissionsanlæg, som er godkendt af Klima-, Energi- og Bygningsministeriet eller Energistyrelsen efter § 4 i lov om Energinet.dk, tager Sikkerhedsstyrelsen dog i almindelighed ikke stilling til, om hensynet til almenvellet kan begrunde, at anlægget skal etableres, men tager alene stilling til det konkrete valg af areal ud fra hensynet til almenvellet samt til anlæggets sikkerhedstekniske forhold. Det skyldes, at spørgsmålet om det pågældende anlægs almennytte i disse tilfælde som udgangspunkt må anses for afklaret ved Energistyrelsens eller Klima-, Energi- og Bygningsministeriets godkendelse af, at anlægget etableres.

Sikkerhedsstyrelsen tager således ved ansøgninger om tilladelse til ekspropriation til andre typer anlæg end de nævnte både stilling til, om almenvellet kan begrunde, at anlægget etableres og det konkrete valg af areal, og stilling til anlæggets sikkerhedstekniske forhold.

Da selve ekspropriationsforretningen skal udføres efter reglerne i lov om fremgangsmåden ved ekspropriation vedrørende fast ejendom, jf. lovbekendtgørelse nr. 1161 af 20. november 2008, er dette anført i lovforslagets § 27.

Efter at Sikkerhedsstyrelsen har givet tilladelse til ekspropriation, fremsender styrelsen sagens akter til transportministeren, som nedsætter ekspropriationskommissioner."